# Sosialurin fimm ár á internetinum

*Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður í samskiftismálum, dagførdi InternetSosialin tann 25. november í 1997*



**Mánadagin fylti InternetSosialurin fimm ár. Síðani tá er hann dagførdur 1249 ferðir, hann hýsir 44.327 greinum, og so at siga allar teldur, sum eru á internetinum í Føroyum, hava vitjað www.sosialurin.fo**

FJØLMIÐLAR
*Eirikur Lindenskov*

Mánadagin vóru liðin fimm ára síðani, at Sámal Petur í Grund, táverandi landsstýrismaður í samskiftismálum, við teldumúsini klikti á tann knøttin, sum alment tendraði InternetSosialin.

Hetta var gjørt í blaðhúsunum hjá Sosialinum úti á Argjum, seinnapartin tann 25. november 1997.

Síðani tá er InternetSosialurin dagførdur 1249 ferðir, og vóru fyrrapartin í gjár at lesa 44.327 ymsar greinar.

Tað var kortini tann 4. september í 1997, at Sosialurin fór undir regluliga at leggja øll tíðindini í blaðnum út á internetið. Men fyrstu mánaðirnir vóru ein royndartíð, fyri at vita, hvussu skipanin riggaði. Tað er Dynamic Paper við Jens Paula Rasmussen í Havn sum hevur ment skipanina, sum blaðið framvegis nýtir.

Nýtslan av internetinum er sum vera man nógv økti hesi fimm árini, og er internetið í dag høvrsmans ogn – og so at siga allar teldur, sum hava internetsamband í Føroyum, havi lisið í InternetSosialinum.

Sámal Petur í Grund, táverandi landsstýrismaður, var ein teirra, sum rættuliga var farin at brúka internetið í 1997. Í røðuni hann helt á Sosialinum hendan dagin segði hann, at hann longu var vanur at senda Sosialinum greinar o.a. tilfar umvegis internetið.

Hann segði eisini, at tá hann stóð í læru sum radiomeikanikari seinast í sjeytiárunum, hoyrdi hann um hendan »mikroprosessorin«, sum nýliga var uppfunnin –og um, hvussu stóran týdning hann fór at fáa í framtíðini.

– Tað var ikki smávegis, man væntaði sær av hesum geniala uppfinnilsi, og í dag mugu vit ásanna, at tøknin alla tíðina yvirhálar okkum, segði Sámal Petur í Grund.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og hósdagin:**
Hvassur vindur ella skrið av landsynningi og stundum regn. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og lítið ella einki avfall. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 6 og 10 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷11 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | 2 |
| Halifax | 4 |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 5 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 8 |
| Tromsø | ÷6 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | ÷5 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 7 |
| Róm | 19 |
| Malorca | 15 |
| Athen | 17 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 22 |
| Beijing | 6 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | 10 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | – |
| Meksikobýur | – |
| Panama | ø |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 31 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt djúpt lágtrýst, 967 hPa vestan fyri Írland fer móti Írlandi, seinni norðureftir. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikudagin.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland fer í útnyrðing og brúgvalagið til Føroya fer spakuliga norðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/11 kl. 06⁰⁰– 26/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 8,5°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,2 mm – mált frá 25/10 kl. 06⁰⁰– 26/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 156,6 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 27. nov | — | 12.26 | 11.26 | — | 11.41 | — | 01.49 | 14.26 | 02.49 | 15.26 | 10.41 | 23.18 | 09.41 | 22.18 | 00.04 | 12.41 | 01.04 | 13.41 | — | 12.11 | 00.49 | 13.26 |
| 28. nov | 01.03 | 13.40 | 00.03 | 12.40 | 00.18 | 12.55 | 03.03 | 15.40 | 04.03 | 16.40 | 11.55 | — | 10.55 | 23.17 | 01.18 | 13.55 | 02.18 | 14.55 | 00.48 | 13.25 | 02.03 | 14.40 |
| 29. nov | 02.02 | 14.25 | 01.02 | 13.25 | 01.17 | 13.40 | 04.02 | 16.25 | 05.02 | 17.25 | 00.17 | 12.40 | 11.40 | — | 02.17 | 14.40 | 03.17 | 15.40 | 01.47 | 14.10 | 03.02 | 15.25 |
| 30. nov | 02.46 | 15.08 | 01.46 | 14.08 | 02.01 | 14.23 | 04.46 | 17.08 | 05.46 | 18.08 | 01.01 | 13.23 | 00.01 | 12.23 | 03.01 | 15.23 | 04.01 | 16.23 | 02.31 | 14.53 | 03.46 | 16.08 |

16. nov.: Mánin longst frá jørðini
27. nov.: Seinna kvarter
2. des.: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002